NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Hoyvíksvegur 5
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 35 17 00
Fax +298 35 17 01

# Tekniskur leiðari
## til felag okkara
# SP/F P.P. Faroe Pelagic í Kollafirði

Vit leita eftir einum persóni, ið skal hava stýr á øllum tí tekniska í framleiðsluni og skal harumframt vera ein partur av leiðslutoyminum. Felagið varð sett á stovn fyrst í desember 2009 og er nú í gongd við at viðka sítt virksemi.

Felagið viðgerð í høvðusheitum frystan fisk, alt samdøgrið um hetta er neyðugt. Felagið hevur sum mál at viðka framleiðsluna so mikið at 1.000 tons kunnu framleiðast dagliga. Hetta væntast at vera liðugt seinast í mai 2011. Henda verkætlan verður framd av einum tekniskum verkætlanarleiðara, ið kemur at hava tætt samstarv við nýsetta tekniska leiðaran.

Persónurin, ið verður settur í starvið má hava kunnleika innan øll viðkomandi øki viðvíkjandi framleiðslu á okkara virkið m.a. automatisering, el , frysting, mekaniskt, arbeiðsgongdir.

Hetta er ein serstakur møguleiki at vera partur av tí ið verður eitt av teimum størstu framleiðsluvirkjunum í Europa.

Tú kemur at hava tætt samstarv við okkara framleiðslu leiðslu. Vit vænta at tú hava viðkomandi útbúgving og fleiri ára arbeiðsroyndir innan økið, og at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur áræði at loysa uppgávur sjálvur. Tú kemur at hava ábyrgd av maskinmonnum á virkinum. Fleksibilitetur, nýskapandi førleikar, praktisk tilgongd, fyriskipanar evni og leiðsluførleikar eru eisini sera umráðandi.

Kunnleika til Enskt – bæði at skriva og tosa er avgerandi – við tað at stórur partur av samskiftinum er á enskum.

Starvið verður sett skjótast tilber og í seinasta lagi í mars 2011.

Løn sambært avtalu.

Meira kunning fæst tið at seta teg í samband við Aad de Jong (+31 653 266167) ella við telduposti: management@ppfaroe.fo

Allar umsóknir, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast við vanligum posti til:

**Sp/f P.P. Faroe Pelagic**
**Postboks 49**
**FO-410 Kollafjørður**
Ella heldur við telduposti til management@ppfaroe.fo
áðrenn 17. januar 2011.

www.sosialurin.fo

Heilsumálaráðið
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Koppseting fyri vetrarbeinkrím

Mælt verður til, at fólk við varandi sjúku – ella av øðrum orsøkum eru í vanda fyri at gerast álvarsliga sjúk av beinkrími, lata seg koppseta fyri vetrarbeinkrím skjótast til ber

Set teg í samband við tín egna lækna og spyr, um tú eigur at koppsetast, um tú hoyrir til ein av hesum bólkum:

**Tú hevur eina av hesum varandi sjúkum:**
- Niðursett lungnavirkni astma
- Hjartasjúku
- Sukursjúku
- Niðursetta immunverju
- Livur- og nýrasvignan
- Ovurfiti (vegleiðandi BMI yvir 40)
- Barnakonur frá 13. barnsburðarviku
- Húsfólk hjá sjúklingum við nógv niðursettari immunverju
- Aðrar varandi sjúkur, har støðan eftir meting frá læknanum viðførir, at beinkrím hevur við sær álvarsligan heilsuvanda

**Koppsetingin verjir tey flestu**
Koppsetingin verjir bæði fyri vanligum beinkrími og fyri nýggjari influensu A (H1N1).
Koppsetingin fyri beinkrími verjir tey flestu, men ikki øll.
Tað ber til at fáa beinkrím, hóast tú er koppsett/-ur, men sjúkugongdin verður oftast mildari.

**Góð ráð**
Beinkrím smittar gjøgnum smáar dropar frá hosta, njósa og tílíkum. Sjúkan spjaðir seg, um tú andar inn droparnar og síðan nemur við eygu, nøs ella munn.

- Hosta og njósa í einnýtis-lummaturriklæði, savna tey í einum afturlatnum posa, til tey verða burturbeind. Ella hosta og njósa í ermuna – ikki í hendurnar.
- Vaska hendurnar gjølla
- Verð heima, um tú ert sjúk/-ur – til tú hevur verið fepurfrí/-ur í eitt samdøgur.

Meiri kunning fæst við á heimasíðunum hjá Heilsumálaráðnum (www.hmr.fo), danska Heilsustýrinum og Statens Serum Institut (www.ssi.dk).

**Landslæknin og Heilsumálaráðið**

Sosialurin 341800

ADVOKATSKRIVSTOVAN

# TVINGSILS-SØLA AV SKIPI

Týsdagin tann 12. apríl 2011, kl. 09.45, verður í Føroya Rætti, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir trolaran m/s Ametyst ow 2383, BRT 299, NRT 125.

Skipið er bygt í 1986 á Vágs skipasmiðju, Vágur. Skipið er skrásett í 1986.

Sambært skipaskrásetingini eigur P/F Faroe Fish I, 100 Tórshavn, skipið.

**Fyrireikandi** tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram í Føroya Rætti týsdagin tann 1. mars 2011, kl. 09.45, og verður tann ið metir seg hava veð í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av Christiani Andreasen, advokati, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 353335

(j.nr.20101047), AS 2-110/2010, sum kann geva bærri upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO



# Hevur tú HUND?

So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL

SKYTTENS hunda- og kettufóðurerkvalitetsfóður, framleitt í Danmark síðan 1970.

**SPECIAL** (20 kg)
Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Gevur blankan pels. Er eisini sera vælegnað til hundar við húð- og pelstrupulleikum og eldri hundar.
**Fyri posan..... kr. 450,-**

**Bílegg beinleiðis á netinum**




**fodursolan.com**
info@fodursolan.com
Ókeypis útkoyring í Havn

Sosialin
-tað loysir seg



# Hús í Tórshavn til sølu

Húsini við Íslandsveg 6 verða við hesum lýst til sølu, áhugaði kunnu ringja

**316095/211169 ella 269081**

www.ebenezer.fo

# SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00
**Øll eru hjartaliga vælkomin!**



EBENEZER